


Í sambandi við bygnaðarbroytingar á Nomatek er okkara fremsta mál at økja um okkara tænastustøði. Vit hava m.a. eina goymslu við rustfríum stáli, gearmotorum, legum, eykalutum o.ø., sum skal tæna bæði okkara egnu framleiðslu og kundum okkara skjótt og væl. Tað, sum ikki liggur á hillini, fáa vit skjótt heim.

Í hesum sambandi leita vit eftir rætta fólkinum.

**STARVIÐ**
Starvið fevnir um goymsluumsiting, avheinting og útkoyring av vørum, bílegging, umsiting av amboðsinnkeypi, vørubóking o.a. Forritið Navision verður nógv nýtt í hesum sambandi.

**FØRLEIKAKRØV**
Tú ert álítandi, arbeiðir sjálvstøðugt, dugir rímiliga væl at orða teg í skrivt og talu og at nýta teldu. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir, tó ikki ein treyt. Vit taka okkum av upplæringini.

**SETANARTREYTIR OG UMSÓKNIR**
Løn og setanartreytir verða ásett sambært avtalu. Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum kunnu sendast við teldubrævi til rm@nomatek.fo ella við vanligum brævi til Nomatek, Postboks 1116, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. mars 2008.

Vilt tú vita meira um starvið, vinarliga set teg í samband við Ragnar Magnussen, stjóra, á tlf. 356 900 ella 556 903.

NOMATEK

SENDISTOVAN



## Kom og ver við at fyriskipa vælferðina í Føroyum

**Fulltrúastørv eru leys at søkja í Almanna- og heilsumálaráðnum við setan skjótast til ber.**

**FULLTRÚI Á FYRISITINGARDEILDINI**
Sum fulltrúi á fyrisitingardeildini kemur tú serliga at arbeiða við at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir. At gera eftirmetingar av lógarøkjum. At svara fyrispurningum frá Løgtinginum. At tulka lógir og reglur fyri Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir ráðnum. Uppgávur tínar verða tillagaðar tíni útbúgving.

**Førleikakrøv**
Embætisprógv í løgfrøði, stjórnmálafrøði, ella aðra tilsvarandi útbúgving.

**FULLTRÚI Á FÍGGJARDEILDINI**
Sum fulltrúi á fíggjardeildini, kemur tú serliga at arbeiða við hagtalsgrundarlagnum og gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan almanna- og heilsuøkið sum heild. At luttaka í tvørgangandi arbeiðsuppgávum innan økið, og vera við til at hava eftirlit við útreiðslunum. Harumframt at ráðgeva stovnunum undir økinum um fíggjarstýring teirra.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi búskaparfrøðilig ella samfelagsfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.

**Felags fyri størvini**
Tey eru áhugaverd og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini í ráðnum. Størvini eru sjálvstøðug, og góðir møguleikar eru fyri førleikamenning.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur. Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til**
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100, Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. mars 2008, kl. 12:00.

Nærri fæst at vita um starvið á Fyrisitingardeildini við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, og um starvið á Fíggjardeildini við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, á telefon 30 40 50, ella teldupost: ahr@ahr.fo.



ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA